UTTAN ÚR HEIMI

# Russisku myndugleikarnir kundu havt forðað gíslatøkuni í Beslan



*Minst 330 fólk, teirra millum 186 børn, doyðu í gíslatøkuni á skúlanum í Beslan tann 1. september í fjør*

*Mynd: Reuters*

**Fleiri av monnunum, sum rændu skúlan í Beslan 1. september í fjør, høvdu verið eftirlýstir í fleiri ár, men myndugleikarnir gjørdu lítið fyri at finna teir**

GÍSLATØKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gáloysni hjá russiskum myndugleikum var í hvussu er ein orsøk til, at tað eydnaðist yvirgangsmonnum at taka skúlan í suðurrussiska býnum Beslan tann 1. september í fjør.

Tað skriva seks tíðindafólk hjá týska vikublaðnum Der Spiegel í einari bók, sum júst er komin út.

Í bókini stendur millum annað, at tann 18. august í fjør fingu allar løgreglustøðirnar í Suðurrusslandi eitt fjarrit frá innanríkisráðnum í Moskva við boðum um, at kekenskir uppreistrarmenn vóru í ferð við at fyrireika eitt álop í Norður-Ossetia, og at álopið helst fór at líkjast tí, sum menn hjá uppreistrarleiðaranum Sjamil Basajev framdu í Budjonovsk í 1995. Ta ferðina tóku uppreistrarmenn eitt sjúkrahús og noyddu russar at samráðast um at taka hermenninar úr Kekenia.

Men hóast fjarritið lat løgreglan 33 uppreistrarmenn, teirra millum tvær kvinnur, sleppa um markið til Norður-Ossetia, sjálvt um tey høvdu bæði granatvarparar, skammbyrsur og maskinbyrsur við sær, skriva tey týsku tíðindafólkini í bókini. Dagin eftir tóku uppreistrarmenninir skúlan í Beslan.

Í bókini stendur, at fleiri av teimum 33 uppreistrarmonnunum, sum sluppu um markið, høvdu verið eftirlýstir í fleiri ár, men at russiska løgreglan gjørdi lítið og einki fyri at finna teir. Ein av høvundunum, Walter Mayr, sigur, at tað er ikki heilt greitt, hvussu nógvir uppreistrarmenninir vóru, men at fólk í Beslan vilja vera við, at teir vóru ímillum 50 og 55 í tali. Tann einasti, sum varð tikin eftir atsóknina, situr í hesum døgum á ákærubonkinum.

Bókin hjá teimum týsku tíðindafólkunum kom út í Russlandi fyrr í vikuni. Aleksandr Pristavkin, sum er ráðgevi hjá Vladimir Putin, forseta, segði í sambandi við útgávuna, at tey týsku tíðindafólkini hava gjørt sær stóran ómak, og at nógvir sannleikar eru í bókini. Hann segði seg tó ikki kunna taka undir við teimum "politisku metingunum" hjá høvundunum.

# Í rættin fyri at vanæra Islam

**Italski rithøvundurin og tíðindakvinnan Oriana Fallaci er ákærd fyri at hava vanærað islamsku trúnna**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Oriana Fallaci, sum er ættað úr Italia, men sum býr í New York, hevur fingið øði í muslimar um allan heimin. Í einari bók, sum hon hevur skrivað, stendur millum annað, at tann islamska trúgvin elvir til hatur ístaðin fyri kærleika, og at hon elvir til trældóm heldur enn frælsi. Harafturat vil hon vera við, at tey seinastu tjúgu árini eru umleið 6.000 fólk myrd í navni Islams.

Nú hevur ein muslimskur mannarættindastríðsmaður meldað Orianu Fallaci fyri ærumeiðing og fyri at hava eggjað til átrúnaðarliga øsing. Málið varð reist í Italia herfyri, men ákæruvaldið vísti tí frá sær. Nú hevur ein dómari í norðuritalska býnum Bergamo kortini gjørt av, at málið skal reisast.

Dómarin, Armando Grasso, sigur, at nakrir setningar í bókini mugu metast sum greið álop á Ilam og trúgvandi muslimar. Tað heldur italski løgmálaráðharrin, Roberto Castelli, ikki. Hann sigur við AP, at eftir hansara tykki er innihaldið í bókini hjá Orianu Fallaci ikki ærumeiðandi, og at eitt rættarmál er eitt álop á tali- og skrivifrælsið.

Tað er ikki greitt enn, nær málið kemur fyri rættin.

## Keglast um valdag

Ætlanin var, at palestinar skuldu velja nýtt tjóðarting tann 17. juli, men nú hevur Mahmoud Abbas, forseti, boðað frá, at neyðugt verður at útseta valið. Valnevndin hevur eisini sagt, at hon vil hava valið útsett, tí hon er ikki liðug við tær neyðugu fyrireikingarnar.

Eygleiðarar í Miðeystri halda, at forsetin vil hava valið útsett, tí teir víðgongdu felagsskapirnir fingu stóra undirtøku á nøkrum kommunuvalum herfyri. Tað fall ikki í góða jørð í Ísrael, og ísraelski uttanríkisráðharrin, Silvan Shalom, hevur sagt, at fær Hamas góða undirtøku á valinum í juli, verður afturtøkan úr Gaza-geiranum helst útsett.

Keldur siga, at Abbas skal hava biðið um fund við leiðsluna í Hamas fyri at fáa hana at góðtaka, at valið verður útsett, men tað tykist ivasamt, hvat hann kann fáa burturúr. Hamas hevur higartil hildið uppá, at valið skal haldast tann 17. juli sum ætlað.

Eygleiðarar siga, at ein útseting kann elva til spenning ímillum Hamas og Fatah-rørsluna, sum stýðjar Mahmoud Abas.

## Ósekur sat 25 ár í fongsli

Í 1978 bleiv Paul Blackburn dømdur 25 ára fongsul fyri at hava myrt ein níggju ára gamlan drong. Nú er hann fríkendur.

Paul Blackburn, sum er úr Cheshire í Onglandi. sat í 18 ymsum fongslum, til hann varð latin leysur fyri tveimum árum síðani. Hann helt alla tíðina uppá, at hann var ósekur, men løgreglumenninir, sum avhoyrdu hann í 1978, hava hinvegin hildið uppá, at hann játtaði seg sekan, men nú hevur ein dómstólur sagt, at tað er ikki óhugsandi, at løgreglumenninir søgdu ósatt. Dómstólurin sigur eisini, at Paul Blackburn, sum var bara 15 ára gamal í 1978, fekk ikki rættvísa viðferð, tí hann fekk ongan verja, tá hann bleiv avhoyrdur.

Sjálvur sigur tann nú 41 ára gamli maðurin, at løgreglumenninir, sum avhoyrdu hann fyri 27 árum síðani, eiga at verða revsaðir. Hann hevur samstundis boðað frá, at hann fer at reisa endurgjaldskrav ímóti tí almenna fyri tey 25 árini, hann hevur sitið í fongsli - ósekur.

## Hava 12.000 rakettir

Islamski Hizbollah-felagsskapurin, sum hevur høvuðsstøð har suðuri í Libanon, hátíðarhelt nú um dagarnar, at fimm ár eru liðin, síðani Ísrael tók sínar seinastu hermenn úr Suðurlibanon.

Ísrael og USA hava kravt, at Hizbollah skal lata vápnini frá sær, men undir hátíðarhaldinum gjørdi leiðarin, Sheikh Hassan Nasrallah, greitt, at tað kemur ikki upp á tal. Hann segði, at tann, sum roynir at taka vápnini frá Hizbollah, verður roknaður sum sami fíggindin, sum Ísrael er, og at limirnir í felagsskapinum fara at svara øllum slíkum ágangi aftur.

Samstundis bleiv upplýst, at Hizbollah hevur 12.000 rakettir í sínum vápnagoymslum, og hetta er fyrstu ferð, at felagsskapurin hevur sagt nakað sum síni vápn. Av og á verða rakettir skotnar inn um ísraelska markið, men tær hava sjáldan gjørt nakran skaða. Kortini hevur Ísrael fleiri ferðir svarað álopunum við at bumba støðir hjá Hizbollah í Suðurlibanon, skrivar AP.

## Ikki eiti á fiskur

Amerikanski stuttleikafiskimaðurin Tim Pruitt gloymir ongantíð leygardagin tann 21. mai í 2005.

Leygarkvøldið var Tim Pruitt farin við tráðuni at vita, um nakað mundi vera at fáa í teirri stóru Missisippi-ánni, og har fekk hann ein ovurstóran fisk av slagnum, tey nevna "malle". Tað tók Tim Pruitt ein hálvan tíma at fáa fiskin inn á áarbakkan, og seinni vísti tað seg, at fiskurin vigaði 112 pund. Ein fiskifrøðingur og ein løgreglumaður komu á staðið, so teir kundu vátta, hvør hevði fingið fiskin, og hvussu stórur hann var. Sambært AP er fiskurin kanska tann størsti av sínum slagi, sum nakrantíð er fiskaður, og tí er líkt til, at Tim Pruitt kemur í metbøkurnar.

Tann ovurstóri fiskurin er enn á lívi, tí myndugleikarnir í býnum Kansas City hava gjørt av, at hann skal verða í einum tanga, sum fólk kunnu fáa høvi at hyggja at honum.